**Samband**

Teldupostur: **heimogskuli@gmail.com**

Heimasíða**: www.heimogskuli.fo**

Kjak og annað á: **facebook.com/HeimOgSkuli**

Foreldrafelagið

# HEIM&SKÚLI

## Landsfelag fyri foreldur og verjar

at børnum í fólkaskúlanum.

Foreldrafelagið
HEIM&SKÚLI



## Arbeiðir fyri

Heim og Skúli arbeiðir fyri einum føroyskum fólkaskúla, sum setur dygdarundirvísing í hásæti: skúlanæmingarnir skulu styrkja sínar fakligu førleikar og læra at nýta sína vitan í breiðum høpi. Eitt gott læringsumhvørvi er eitt stað har børnini trívast, og tí skal trivnaðurin varðveitast. Hvussu kunnu vit foreldur stuðla uppundir hetta?

## Limir

Limir í landsfelagnum eru fólkavaldu foreldraumboðini í skúlastýrunum á teimum gott 40 fólkaskúlunum kring alt landið. Øll foreldur við skúlabørnum kunnu tekna limaskap.



Felagið varð stovnað á aðalfundi í Kommunuskúlanum í Tórshavn 10. juni 2006

## Nevndin



Seinastu árini hevur nevndin skipað fyri 1-2 felags fundum árliga til førleikamenning og íblástur fyri skúlastýrislimir og onnur áhugað. Harafturat er tað árligi aðalfundurin, har tað eisini er fyrilestur og kjak á skránni. Fundirnir verða skipaðir á ymsum skúlum í Tórshavn, oftast leygardag, tí tað er høgligast í mun til at fólk kring landið skulu kunnu hava møguleika at koma til og frá fundinum sama dag.



Nevndin úttalar seg og ger viðmerkingar til aktuel mál av týdningi fyri heim & skúla samstarv til miðlar og myndugleikar.

Nevndin umboðar felagið í Fólkaskúlaráðnum og ymsum arbeiðsbólkum eftir áheitan.

